Eitt ljós á gøtu míni

»Tí at annan grundvøll kann eingin leggja enn tann, sum lagdur er, og hann er Jesus Kristus.«

(1. Kor. 3,11)


Grundvøllurin er Kristus — Kristi fullgjørda verk.

Øll menniskju byggja sær upp eitt sælunnarhús — tey trúgva ella vóna at verða sæl aftan á deyðan. Men tey flestu byggja vón teirra á ein svikaligan grundvøll, á teirra egnu deyðu gerðir. Og tí verður lívsvón teirra ikki standandi. Fer hon ikki um koll, meðan tey eru á lívi, so verður tað teimum ósigandi ræðsla tann dagin, tey doyggja.

Tað er heimsins synd, at hann vil leggja ein annan grundvøll. Og tað er heimsins vanlagna.

»Tí eingin kann leggja annan grundvøll enn tann, sum lagdur er, og hann er Jesus Kristus«. Hesin grundvøllur heldur bæði í lívi og deyða. Vit, sum byggja lív okkara á hann, vit skulu ikki vikast um ævir. Vit trúgva, at Gud hevur strikað synd okkara, at hann vil varðveita okkum og geva okkum sigur, ja, æviga sælu — bert fyri Jesu skyld.

Tað er vissa, tað er hvíla, tað er trygd. Húsið kann verða skakað av storminum, men *grundvøllurin ikki, tí hann er hin ævigi kletturin — Kristus.*



Gudstænastur 8. sunnudag eftir trinitatis

Vesturkirkjan: Uni Næs
Havnar kirkja: Petur Martin Rasmussen
Nólsoy: Hans J. Joensen og Leif Andersen, altargangur. Aftan á gudstænastuna verður heimari partur av kirkjugarðinum vígdur.
Hestur: Høgni Poulsen
Hósvík: Martin R. Jacobsen, kl. 12, altargangur
Gjógv: Emil Olsen, kl. 12, altargangur
Vestmanna: Gerhard Hansen, kl. 11.
Kvívík: Marjun Bæk, kl. 12.
Klaksvík: Elsa Funding, altargangur.
Kunoy: Niels Pauli Danielsen, altargangur.
Árnafjørður: Henning Bøgesvang, kl. 12.
Nes: Jákup Kass, kl. 11, altargangur
Tvøroyri: Jónsvein Bech, kl. 11, altargongur
Sandvík: Birgitte Johannesen, kl. 18

Gudstænasta

Kristianskirkjan: Altargangur við Elsu Funding.

Nærvarp Okkara í Keypmannahavn

er farið í summarfrí. Sendir aftur fyrsta sunnudag í september klokkan 13—15.

KFUK

Bingo verður mánakvøldið kl. 19.30.



17. juli fingu Marita og Petur Frederik Holm, Trongisvági, eina dóttur.

17. juli fingu Lis M. Larsen og Carl A. Arge, Torshavn, eina dóttur.

18. juli fingu Birgir B. og Jákup Danielsen, Skála, eina dóttur.

18. juli fingu Katrin Olsen og Árni Højgaard, Toftum, ein son.

18. juli fingu Anna og Heri Larsen, Tórshavn, ein son.

18. juli fingu Jenny Olsen og Bogi Jensen, Klaksvík, ein son.

20. juli fingu Ann og Eyðstein Sørensen, Sandi, ein son.

15. juli fingu Jannet Jacobsen og Hans A. Dam, Tórshavn eina dóttur.

15. juli fingu Joan Kelduberg og Frank Hellisdal, Hoyvík, eina dóttur.

16. juli fingu Oleina Petersen og Ranjan Kanagasingam, Skála, eina dóttur.

Læknavaktir

Tórshavn: Kaj Kallsberg, tlf. 13150, leygardag og Álvur av Kák, tlf. 12557, sunnudag.

Eysturoy: Knud Jacobsen, tlf. 23006, leygardag og Cartin Vagn-Hansen, tlf. 44038, sunnudag.

Norðuroyggjar: Jaspur Petersen, tlf. 56400.

Vágar: Tlf. 34213.

Suðuroy (norður): Tlf. 71560.

Suðuroy (suður): Tlf. 73030.

Tannlæknavaktin Tórshavn

Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13.00—14.00.
Tlf. 14544.

Verkfrøði útkomið



Blaðið hjá føroyskum verkfrøðingum, »Verkfrøði« er júst útkomið. Har eru fleiri áhugaverdar greinar. Eitt nú er samrøða við Gunnar Waagstein, forstjóra í byggifyritøkuni G. Waagstein« um nógva byggivirksemi í landinum. Har er so eisini frásøgn um fyritøkuna, sum hevur 40 ár á baki í ár.

Blaðið hevur eisini samrøðu við ein danskan orkuserfrøðing. Tað er Preben Maegaard, sum tosar um møguleika føroyinga at gera brúk av vindmyllum.

Úr innihaldinum kann annars nevnast greinir um: vatnorkuútbyggingina á Eiði, hugleiðingar um flogmálið, norðmenn, sum eru í ferð við at byggja alduorkuverk í Indonesia o.m.a.

Verkfrøði hevur annars fingið nýggja blaðstjórn. Í henni sita Per Midjord (ábyrgd) og Bjarki Johannesen.

Blaðið kostar 7 kr. í leysasølu, verður sett, umbrotið og prentað á Sosialinum.

Framhald av síðu 21

sosiala trygd og økta velferð, men eisini grundað á medábyrgd, medavgerð og medgin til samfelagsvirðini, meðan borgarliga demokratið verður varðveitt.

FÓLKAFLOKKURIN UTTAN POLITISKA ÁVIRKAN NÓGV ÁR FRAMYVIR

Aftan á seinasta løgtingsval, gjørdi Javnaðarflokkurin greitt, at hann ikki vildi samarbeiða við Fólkaflokkin, so leingi hann var undir leiðslu av Óla Breckmann, og fyrdi hansara politikk. Nú, skjótt fýra ár seinni, sær tað út sum um Jógvan Sundstein fullkomiliga hevur mist tamarhaldið, hann sum formaður átti at havt, ella letur hann bara Óla gera tað skitna arbeiðið. Fólkaflokkurin er sostatt farin so langt út á høgraveinginn, at hann helst kemur at sita uttan politiska ávirkan í nógv ár framyvir.

Teir kunnu so kalla hesa støðu ódemokratiska. Men vit í Javnaðarflokkinum kalla hetta eina greiða demokratiska støðu. Vit kenna sama fyribrygdið úr Danmark. Eingin flokkur — heldur ikki teir konservativu, sum í mun til okkara Fólkaflokk eru blóðreyðir — vil samstarva við Framburðsflokkin hjá Glistrup, um eisini liggur langt úti á høgraveinginum.

Hesum mugu fólkafloksfólk smyrja seg við, ella ávirka flokkin til at skifta kós.

Saman við demokratiskum flokkum, vil Javnaðarflokkurin arbeiða fyri einum samfelag, har øll hava somu rættindi, góð livikor og somu ávirkan. Javnaðarflokkurin vil altíð arbeiða hart ímóti rasismuni, sum nú er vaksandi her um leiðir, og fyri mannarættindum fyri øll — eingin undantikin.

Eirikur Lindenskov



Kunngjørt verður fyri ætt og vinum at okkara kæri

FRIDTJOF JOENSEN
myndahøggari
Klaksvik

andaðist 19. juli, 67 ára gamal.
Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni í dag kl. 13.00.

Josfrid, Bernhardina, Fridtjof og Heðin